Endaligi hópurin

Til seinna landsdystin móti Kasakstan, hevur Henrik Larsen tikið fylgjandi leikarar út:

Jens Martin Knudsen, NSÍ
Jákup Mikkelsen, Molde
Hans Fróði Hansen, B68
Súni Olsen, GÍ
Jón Rói Jacobsen, Brøndby
Jann Ingi Petersen, B68
Fróði Benjaminsen, B68
Jákup á Borg, B36
John Petersen, B36
Hjalgrím Elttør, KÍ
Julian Johnsson, B36
Pól Thorsteinsson, B36
Allan Joensen, KÍ
Rógvi Jacobsen, HB
Andrew av Fløtum, HB
Óli Johannesen, Hvidovre
Ingi Højsted, Arsenal
Christian Høgni Jacobsen, Vejle

Uttøkukapping í Triathlon

Føroya Triathlon Felag skipaði leygardagin kl. 13.00 fyri úttøkukapping til Oyggjaleikirnar í 1/4 triathlon, sokallaða OL-teininum, sum er 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

TRIATHLON
tíðindaskriv

Elisabeth Johannesen, sum her leskar sær á undir kappingini, er onnur av kvinnunum, sum fara at umboða Føroyar á komandi Oyggjaleikunum

Sami teinur er hjá kvinnum og monnum.

Fyrst verður svomið 1500 m í Svimjihøllini, síðani súkklað 40 km. eftir Ringvegnum, Hvítanesvegnum og Kaldbaksvegnum til Kaldbaks, Kaldbaksbotn, Kaldbaks, og so aftur til Havnar, til Skógrøkt Landsins, har skift verður til renning.

Runnið verður síðani tvær ferðir eftir vegnum Fram við Strond til Føroya Sparikassa, og aftur til Skógrøkt Landsins, har málið er.

Tað er soleiðis í triathlon, at tá skift verður millum ítróttagreinirnar, mugu íðkararnir eisini skifta í klæðir, sum hóska til ítóttagreinina. Fyrsta skiftið er frá svimjingini til súkklingina, og skal íðkarin renna frá svimjihylinum til súkkluna, sum stendur uttanfyri, á vegnum skal so hann skifta í súkkluklæðir.

Annað skiftið er frá súkkling til renning, og er tá "bara" at fara úr súkkluskónum og í renniskógvarnar, og so avstað, tað skiftið sæst tó ikki niðanfyri.

Hesi skifti verða ofta rópt "gloymda ítróttagreinin", tí íðkararnir geva skiftunum ov lítlan ans, og missa nógva tíð óneyðugt. Ofta er munurin fleiru minuttir, og serliga ein dag sum hendan, tá tað var nógvur vindur, regn og kalt.

Verður hugt eftir úrslitatalvunum, sæst ein stórur munur í tíðunum til skiftini, og er hetta tí at íðkararnir lótu seg væl í hendan dagin, tí ikki er tespuligt at fara út við vátum hári, stuttum ermum og stuttum brókum.

Ein góðan summardag verður gjørt nógv skjótari av, og kunnu tá skjótastu íðkararnir skifta millum svimjing og súkkling upp á minni enn 1 minutt.

Eftir kappingina varð endaliga Oyl-liðið úttikið, og er samansetingin av hesum soleiðis. Hjá monnum verða tað Beinir Rasmussen, Gudmundur Joensen, Kári Simonsen og Eyðtór Joensen, sum mannað liðið. Tær báðar kvinnurnar verða Joan Bláfoss og Elisabeth Rasmussen

Tíðirnar í kappingini vóru annars hesar

Nr.	Navn	Svimjing	Skift	Sú/16 km.	Sú/24 km	Sú/40 km.	Renn/5 km.	Renn/ 10 km
1.	Beinir Rasmussen	25,33	2,27	27,50	14,55	34,55	24,20	25,15
2.	Gudmundur Joensen	20.49	2.11	32.51	18.26	40.45	23.11	23.56
3.	Kári Simonsen	28.17	3.13	30.45	16.40	39.55	25.28	27.02
4.	Eyðtór Joensen	41.36	3.54	29.55	15.50	35.54	25.13	25.45
5.	Joan Bláfoss	28.35	2.28	31.42	19.55	41.55	25.50	25.47
6.	Elisabeth Johannesen	32.34	3.18	35.33	20.40	45.46	31.49	33.34

Sportmaster og Badmintonsambandið gjørt sponsoravtalu

Teir tríggir myntirnir, sum badmintonleikarar framyvir kunnu ogna sær

Mynd: Álvur Haraldsen

Fríggjadagin skrivaðu Sportmaster og Badmintonsambandið undir eina heldur serliga sponsoravtalu

SPONSORAVTALA
Jákup Mørk

Sponsoravtalur plaga vanliga vera nakað, har ein fyritøka letur ávísa peningaupphædd, og so afturfyri fær eitt ella annað slag av lýsingarvirði. Soleiðis man áskoðanin til hetta í øllum førum vera flesta staðni, men fríggjadagin varð so ein heldur ørvísi sponsoravtala undirskrivað.

Talan er ein avtala millum Sportmaster og Badminton-sambandið, sum í veruleikanum snýr seg um nakað so einfalt sum gávukort, men hesi gávukortini eru kortini nakað serligt.

Framyvir verður nevnliga so, at Badmintonsambandið sjálvt og eisini ymsu feløgini hava møguleikan at heiðra einstøkum leikarum við nøkrum myntum. Alt eftir avrikinum kunnu hesir vera úr gulli, silvuri ella bronsu, og tað er í sjálvum sær helst stuttligt hjá íðkarunum at fáa slíka viðurkenning.

Tað serliga við hesum myntum er tó, at teir samstundis eru gávukort til Sportmaster. Fær ein badmintonleikari t.d. ein gullmynt, hevur hesin eitt virði upp á 225 kr., og so verður tað so upp til leikaran, um myntur skal nýtast at keypast fyri, ella um hann heldur skal verða varveittur við hús.

Bronsuvinnarar úr Vági

At tær vaksnu kvinnurnar í Vági standa seg væl í Hondbólti, er onki nýtt. Men eisini tær yngru klára seg væl og eitt nú vunnu genturnar 14-17 ár, bronsu í landskappingini.

Vit fingu eina mynd av liðnum eftir at tær høvdu fingið heiðursmerkini um hálsin.

Standandi frá vinstru eru tær: Rutt Lisberg, Jóna Thorsteinsson, Sirið Gudmundsson, Joy Jensen, Lív Larsen og Connie Bertholdsen Brockie.Húkandi frá vinstru eru tær: Lissy Kjærbo, Alice Tausen, Anna Djurhuus, Carol Kjærbæk og Jacoba Poulsen.

KR-HB 2-0 (1-0):Steypið varð verandi

HB fekk góða dystarvenjing, men steyp fingu teir ikki við sær úr Íslandi

ATLANTIC CUP
Jákup Mørk

Føroyameistarnir úr HB vóru í Íslandi um vikuskiftið. Ørindini vóru árligi Atlantic Cup dysturin, sum er vorðin afturvendandi hending, har føroysku og íslendsku meistararnir royna seg móti hvørjum øðrum.

Íslendskur fótbóltur verður vanliga styrkismettur nakað hægri enn føroyskur, og tað var eisini KR, sum var stinnara liðið sunnudagin, tá dysturin fór fram.

Endaliga úrslitið gjørdist 2-0 til K, og sum skilst, so var hetta heldur ikki heilt av leið. Íslendska liðið, sum m.a. hevur 10 antin nú- ella fyrrverandi íslendskar landsliðsleikarar í hópinum hevði leikligu yvirvágina í dystinum, og tað vóru eisini teir, sum høvdu flestu málmøguleikarnar. Tann fyrst stóra av slagnum áttu havnarmenninir tó, tá Carsten From slapp leysur móti málverjanum, men skot hansara fór við síðuna av málinum.

Fyrra íslendska málið kom miðskeiðis í fyrra hálvleiki eftir brotsspark, tá dómarin metti Hall Danielsen hava hond á bóltinum. Tað seinna kom eitt korter eftir steðgin, tá HB verjan ikki var nóg ansin við eitt innlegg úr vinstra borði.

Soleiðis gjørdist talan ikki um nakað steyp til HB á hesum sinni, men talan mundi tó vera um góða dystarvenjing, og tá liðið eisini nýtti íslandsferðina sum eitt slag av venjingarlegu, er lítið at ivast í, at hetta hevur verið góður kostur, nú fyrireikingarnar til landskappingina nærkast endanum.

Hópurin hjá HB skuldi koma aftur til Føroya mánakvøldið.

KR-HB 2-0 (1-0)
1-0 Arnar Gunnlaugsson (br)
2-0 Sigurvin Ólafsson

Vejle hómar superliguna

Hjá Hvidovre stendur illa til, eftir at teir á heimavølli taptu ímóti Vejle, sum nú er á triðja plássi

DANMARK
1. DEILD
Jóannes Hansen

Tað kann ganga skjótt hvønn vegin í fótbólti. Tað er støðan hjá Vejle gott dømi um. Fyri einum mánað síðani vóru teir mitt í røðini, og allar vónir um superliguna vóru langt burtur. So góvu teir venjaranum sekkin, og nýggi venjarin hevur megnað rættuliga at vent skútuni.

Sunnudagin vann Vejle 4–1 í Hvidorve, sum hevði Óla Johannesen á liðnum. Ulrik Balling er flúgvandi á Vejle liðnum. Sunnudagin skoraði hann til 3–1. Undir fyrra venjaranum var Christian Høgni Jacobsen vongverji. Men nýggi venjarin metir hann sum álopsspælara. Trupulleikin er, at Ulrik Balling er so góður, at Christian Høgni sleppur ikki framat har frammi.

Sunnudagin vann Herfølge 3–1 á heimavølli ímóti Frem. Harvið er Herfølge so at siga flutt upp, hóast venjarin sigur, at teir bara hugsa um ein dyst í senn. Hjá Frem kom tapið illa við. Nú eru teir bara trý stig frammanfyri Vejle.

Hvidovre er á niðurflytingarplássi eftir tapið ímóti Vejle. Tað kom illa við hjá teimum, at B93 vann grannadystin ímóti HIK 4–2.

Sami munur í toppinum

Bæði FCK, sum hevði Toda Jónsson millum málskjúttarnar, og Brøndby vunnu sannførandi, meðan Fraum tapti stórt

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað broyttist einki millum stóru høvuðsstaðarfeløgini í Danmark, sum kappast um meistaraskapin. Leygardagin vann FCK 5–0 í Køge, sum líkist alt meiri niðurflytara, og sunnudagin vann Brøndby 3–1 á heimavølli ímóti FCM, sum frammanundan dystinum var roknað sum hóttan ímóti Brøndby. Farum, sum lá undir liðini á Brøndby, tapti 5–1 í Silkeborg, eftir at teir høvdu verið á odda 1–0.

FCK sigurin var sera sannførandi. Jörgen Pettersson skoraði tvey tey fyrstu málini, eftir at hann varð fríspældur av Køge verjuni. Todi Jónsson spældi síðstu tjúgu minuttirnar. Hann loysti Peter Møller, sum hevði skorað til 4–0 av. Todi staðfesti rimmar sigurin, tá hann setti fótin undir innlegg frá Carsten Fredgaard.

Brøndby spældi FCM sundur og saman. Tað sóu 10.889 áskoðarar. Heimaliðið hevði nógvar møguleikar og var frammanfyri 3–0, áðrenn gestirnir í síðstu løtu pyntaðu um.

Silkeborg var fyri ikki so langari tíð síðani fimm stig niðanfyri strikuna. 5–1 sigurin á Farum var tann triði upp í slag, og nú eru teir væl omanfyri strikuna. Tað er AB eisini. Teir hava verið hóttir av niðurflyting, men eftir 3–1 heimasigurin á AaB tykist vandin vera burtur hjá akademikarunum.

Viborg og AGF spældu 0–0. Stóra umrøðan í donskum fótbólti nú snýr seg um, um Poul Hansen, venjarin hjá AGF, fer at fáa sekkin í hesi vikuni. AGF hevur kós ímóti niðurflyting, og tað var ikki ætlanin við øllum milliónunum, sum eru lagdar í nýggjan venjara og nýggjar spælarar.

OB og Esbjerg eru lið um lið á talvuni, og tey spældu 1–1 í Odense.

Molde tapti aftur á útivølli

Sogndal er framvegis oddalið í Noregi, har Rosenborg er komið betri frá fyrstu umførunum, enn teir gjørdu í fjør

NOREG
Jóannes Hansen

Gamla føroyska felagið í Noregi, Sogndal, er á odda í Tippuliguni. At teir eru betri fyri, enn teir plaga at vera, vístu teir aftur leygardagin, tá ið teir vunnu 3–1 á heimavølli ímóti uppflytarunum úr Tromsø. Í Sogndal hava teir altíð hugsað fyrst um at bjarga sær lívinum í bestu deildini, áðrenn teir hava hugt uppeftir. Nú eru teir á odda, og so er spurningurin, hvussu leingi tað verður. Men vandin fyri niðurflyting er í hvussu so er fyribils langt burtur.

Molde var í Bodø, og aftur hesa ferð komu teir tómhentir til hús aftur. Bodø vann 2–0. Eddie Gustafsson var í Molde málinum allar 90 minuttirnar. Hann fær í VG eitt trý tal fyri sítt avrik.

Rosenborg spældi ikki væl fyrstu umførini í fjør, tá ið teir kortini megnaðu at vinna NM – fyri 11. ferð upp í slag. At teir eru væl fyri nú sást, tá ið teir vunnu 3–0 á útivølli ímóti Lyn.

Lillestrøm skinklar av álvara. Hesa ferð taptu teir 2–0 á heimavølli ímóti Stabæk.

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FCK	25	13	-	7	-	5	39	25	14	46
2 Brøndby (M)	25	12	-	8	-	5	48	26	22	44
3 Farum	25	13	-	2	-	10	39	45	-6	41
4 FCM	25	9	-	8	-	8	38	32	6	35
5 Esbjerg	25	9	-	8	-	8	48	47	1	35
6 OB (S)	25	8	-	10	-	7	40	34	6	34
7 AaB	25	10	-	3	-	12	32	36	-4	33
8 AB	25	8	-	8	-	9	32	35	-3	32
9 Silkeborg	25	8	-	7	-	10	38	35	3	31
10 Viborg	25	6	-	9	-	10	38	43	-5	27
11 AGF	25	7	-	6	-	12	33	47	-14	27
12 Køge	25	8	-	2	-	15	37	57	-20	26

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Herfølge	22	17	-	2	-	3	53	25	28	53
2 Frem	22	13	-	4	-	5	49	31	18	43
3 Vejle	22	12	-	4	-	6	45	34	11	40
4 Fredericia	22	10	-	7	-	5	31	17	14	37
5 Skjold	22	10	-	4	-	8	38	25	13	34
6 HFK Sønderj.	22	8	-	7	-	7	42	39	3	31
7 Randers F.	22	9	-	4	-	9	39	38	1	31
8 Ølstykke	22	7	-	8	-	7	44	43	1	29
9 Brønshøj	22	8	-	4	-	10	36	34	2	28
10 FC Aarhus	22	8	-	3	-	11	33	38	-5	27
11 B 93	22	7	-	5	-	10	32	36	-4	26
12 AC Horsens	22	6	-	7	-	9	31	36	-5	25
13 B 1913	22	6	-	5	-	11	27	42	-15	23
14 Hvidovre	22	6	-	5	-	11	26	44	-18	23
15 B 1909	22	4	-	7	-	11	35	53	-18	19
16 HIK	22	5	-	4	-	13	28	54	-26	19

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre), John Heri Dam (Hvidovre)

Norska tippeligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Sogndal	3	3	-	0	-	0	6	2	4	9
2 Viking	3	2	-	1	-	0	7	2	5	7
3 Stabæk	3	2	-	0	-	1	7	3	4	6
4 Rosenborg	3	2	-	0	-	1	7	4	3	6
5 Odd Grenland	3	2	-	0	-	1	5	6	-1	6
6 Lyn	3	1	-	1	-	1	5	3	2	4
7 Tromsø	3	1	-	1	-	1	6	7	-1	4
8 Molde	2	1	-	0	-	1	4	1	3	3
9 Bodø/Glimt	2	1	-	0	-	1	3	3	0	3
10 Vålerenga	3	1	-	0	-	2	3	4	-1	3
11 Lillestrøm	3	1	-	0	-	2	1	6	-5	3
12 Brann	3	0	-	2	-	1	4	9	-5	2
13 Aalesund	3	0	-	1	-	2	6	9	-3	1
14 Bryne	3	0	-	0	-	3	2	7	-5	0

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)